**Landsskattanevndaravgerð, mál nr. 17/1989 og 18/1989**

Evni: Avskriving
Lóg: §§ 17 og 20 í avskrivingarlógini

Samandráttur:

Skattgjaldari, sum er eitt partafelag, sum hevur bakarí, har høvuðspartaeigari við húski býr í ovaru hædd, meðan niðara hædd verður nýtt til bakarí, kært um, at skattavaldið ikki hevur givið loyvi til avskriving av bygninginum fyri árini 1986 og 1987. Grundgevingin er at bygningurin smb. § 17, a) í avskrivingarlógini ikki verður nýttur til bakarí burturav.

Málið hevur síðani verið viðgjørt á fundi í Landsskattanevndini og var har av einum meiriluta samtykt at geva líkningarvaldinum viðhald og við somu grundgeving sum Líkningarráð Føroya.

Málslýsing:

Partafelag, sum hevur bakarí, hevur til Landsskattanevndina sent kæru um, at líkningarvaldið ikki hevur loyvt avskriving av bygningi fyri árini 1986 og 1987 og hava sum grundgeving fyri kæruni ført fylgjandi fram:

"Sum grund fyri gjørdu avskrivingunum havi eg nýtt avskrivingarlógina S 17, litra a), í tí líki, ið hon var í, tá ið eg gjørdi avskrivingarnar.

Sambært skriv frá LF deildini í X verður sagt, at eftir deildarinnar áskoðan er bygningurin ikki avskrivingarbærur, tí "bygningurin ikki burturav verður nýttur til handverk og ídnað. Men tað, sum má verða tað avgerandi í hesum máli, má vera lógin, sum er galdandi, tá ið avskrivingin verður framd, og er nevniliga roknskapurin fyri skattaárið 1986 gjørdur, tá ið lóg nr. 74 dagfest 12. juni 1986 er galdandi, hvar orðið burturav slett ikki verður nevnt. Somuleiðis er avskrivingin í roknskapinum fyri skattaárið 1987 gjørd, tá ið lóg nr. 59 dagfest 8. mei 1987 er galdandi, hvar orðið burturav heldur ikki verður nevnt. Sostatt meini eg framvegis, at tær av mær gjørdu avskrivingar eru rættar."

Kæran hevur verið løgd fyri Líkningarráð Føroya, sum gevur hetta ummæli og tilmæli:

"Ráðið hevur fingið upplýst frá deildini í x at talan er um eini hús í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini býr høvuðspartaeigarin við húski, meðan niðara hæddin verður nýtt til bakarí. Eftir ráðsins metan kann ein tilíkur bygningur ikki roknast sum "nýttur til handverk og ídnað".

§ 17 í avskrivingarlógini er broytt fleiri ferðir seinastu árini.

Í løgtingslóg nr. 74 frá 12. juni 1986 verður táverandi litra a býtt í eitt nýtt litra a og litra b, meðan táverandi litra b verður broytt til litra c. Orsøkin til hesa broyting vóru nýggju reglurnar

um flyting av negativari saldo millum kapitlarnar í avskrivingarlógini. Í føroyska tekstinum var orðingin av litra a:

"Bygningar, sum verða nýttir til handverk og ídnað".

Í danska tekstinum var tilsvarandi orðingin: "Bygninger, som udelukkende anvendes til håndværk og industri".

Í løgtingslóg nr. 59 frá 8. mei 1987 verður fyri at nágreina galdandi mannagongd skoytt uppí litra a: "her íroknað neyðug skrivstovu- og goymsluhølir."

Í samband við hesa broyting dettur orðið "udelukkende"" burtur úr danska tekstinum.

Tað sæst ikki av viðmerkingunum til lógaruppskotið, hví nevnda orð verður tikið burtur úr tekstinum.

Hóast orðini burturav/udelukkende ikki beinleiðis stóðu í lógartekstinum aftaná omanfyri nevndu lógarbroytingar, so hevur lóggávuvaldið kortini mett tey at liggja í sjálvari orðingini: "Bygningar, sum verða nýttir til handverk og ídnað". "Bygning, som anvendes til håndværk og industri."

Hetta sæst av broytingini í løgtingslóg nr. 51 frá 20. mei 1988, tá ið orðini: "bert/udelukkende" verða sett inn í S 17 litra a í avskrivingarlógini.

Í viðmerkingum til hesa broyting verður sagt:

"Broytingin er ein nágreining av verandi reglu og mannagongd, hareftir bygningar, sum burturav verða nýttir til handverk og ídnað, her íroknað neyðug skrivstovu- og goymsluhøli, kunnu avskrivast eftir reglunum í § 20, um hesir verða nýttir vinnuliga.

Grundað á frammanfyristandandi frágreiðing fer ráðið at mæla Landsskattanevndini til at staðfesta álíkningina, ið er gjørd av deild ráðsins."

Málið hevur síðani verið viðgjørt á fundi í Landsskattanevndini og var har av einum meiriluta samtykt at geva líkningarvaldinum viðhald og við somu grundgeving sum Líkningarráð Føroya.

*Kelda:*
*Bls. 185-186 í Landsskattanevndaravgerðum 1984 - 1997*
*Toll- og skattstova Føroya 1999*
*Tøk 09.02.2022 á www.taks.fo/media/1746/landsskattanevndaravgerdir-1984-1997.pdf*